Søljan-VÍF 27-21 (9-10):

# Søljan heldur oddasessinum



*Fagnaðurin vesturi á Vágum er stórur, nú Søljan eftir tvey umfør er á odda í bestu kvinnudeildini*

*Savnsmynd*

**Við tryggum sigri á einum VÍF liði, sum at kalla er undir endurstovnan, helt Søljan fast um óvanda oddasessin**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað hevur ikki verið vanligt seinnu árini, men veruleikin sigur, at Søljan eftir tvey umfør er oddalið í bestu kvinnudeildini í hondbólti.

Fyrsta umfarið vunnu tær stórsigur á Tjaldri, og hesaferð var tað VÍF, sum stóð fyri skotum. VÍF hevur annars seinnu árini verið eitt av avgjørt sterkastu kvinnuliðunum í landinum, men í er so ikki líkt til, at tær skulu hava nakran leiklut í heiðursmerkjarøðini.

### Kappskjóting

Fyrstu longu løtuna var annars líkt til, at talan skuldi gerast um eina hampuliga javna uppgerð. Liðini bæði hava í Nicoletu Radu Hansen og Ioanu Rápa hvør sín stórskjútta, og tær báðar skiftust so hampuliga væl um at skora fyrsta hálva tíman. Ioana og VÍF vóru tó eitt vet stinnari, men tær megnaðu tó ikki at halda leiðsluni allan vegin.

Nú var tað heldur ikki bert Nicoleta, sum dugdi at senda bóltin í kassan. Søljan hevur umframt hana eisini aðrar leikarar, sum væl duga at spæla hondbólt. Leikarar, sum nú í trý ár hava vant seg við umstøðurnar í bestu deildini, og sum saman við útlendska styrkinum hjá felagnum av álvara tykjast vera í ferð við at blóma.

VÍF hevi tó leingi munin, men seinastu tíggju minutt-irnar ella so punkteraðu gestirnir. Ioana varð hildin í einum jarntaki, og við seks málum á rað støðafesti Søljan, at tær ikki hava nakrar ætlanir um at geva seg yvir.

### Styrkisroynd

Hvussu langt Søljan kann røkka, er kanska eitt sindur trupult at staðfesta longu nú, bert tvey umfør eru leikt. Ein ábending um hetta fæst tó helst komandi vikuskifti, tá VB kemur vestur á vitjan.

Hjá VÍF er spurningurin í løtuni helst meira um at uppbyggja eitt nýtt sterkt lið, og heilt galið fer tað væl neyvan at ganga, hóast tær enn eru stigaleysar. Hóast frágongd, so telir liðið enn nakrar av teimum, sum í tvey ár vóru við til at vinna tað, sum vinnast kundi, og hartil eru eisini fleiri aðrar yngru leikarar, sum spakuliga eru í ferð við at menna seg fyrstudeildarleikarar. Hvussu leingi tann menningin so fer at taka, kann tó bert tíðin vísa.

**FAKTA UM DYSTIN**

**Søljan-VÍF 27-21 (9-10)**
**Málskjúttar**
**Søljan:** Nicoleta Radu 11(2), Lina Andriulyte 7(1), Heidi Maria Akselsen 4, Arnleyg Haraldsen 3(2), Fía Selma Nielsen 1, Heidi Haraldsen 1
**VÍF:** Ioana Rápa 12(3), Eyðritt Andreasen 3, Linda Johannesen 3, Kirstin Helgadóttir 2
**Brotskøst:** Søljan 8, VÍF 6
**Útvísingar:** Søljan 6, VÍF 4
**Dómarar:** Heri Petersen & Brandur Johannesen

## Trý umfør leikt á Mallorka

**Mallorka: Føroyska talvlandsliðið hevur ikki fingið eina ynskibyrjan í talvolympiaduni, men hinvegin heldur onga katastrofubyrjan**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*



4 stig av 12 er úrtøkan higartil. Telvað verða 14 umfør.

Fyrsti dysturin endaði við lemjandi 3,5-0,5 tapi móti Moldavia, sum hevði tveir stórmeistarar og tveir altjóða meistarar á liðnum. Moldavar hættaðu sær at hvíla teirra stjørnutelvara, Viktor Bologan (2669), í dystinum móti okkum. Hans Kristian Simonsen varð maðurin sum bjargadi okkum hálva stigið.

Leygardagin vóru vit favorittar móti Palestina og vunnu eisini ein tepran 2,5-1,5 sigur. Stuttligt og hugvekjandi var at síggja, at stórmeistarin sum mannaði 1. borð hjá palestinensum, var úr Bulgaria og jødi. Ein sonn mynd um vón í kaosmeldrinum í heimlandinum Palestina.

Martin Poulsen leikti skeivt tíðliga í talvinum og varð við brestin revsaður av stórmeistaranum. Á hinum borðunum vóru vit greiðir ratingfavorittar og vit fingu eisini hálvttriðja stig av trimum. Hans Kristian leikti javnt á 2. borði, meðan John Rødgaard og Eyðun Nolsoe vunnu trygt á aftaru borðunum. Eyðun hoppaði inn fyri Olaf Berg í hesum dystinum.

Sunnudagin fingu vit eina spennandi avbjóðing, tá mótstøðuliðið var Mongolia. Á øllum borðum høvdu teir hægri rating enn vit, m.a. við tveimum stórmeistarum, men kortini hildu vit at vit kundu gera ein vørr. Tíverri blakaðu vit nakrar góðar støður vekk og taptu loksins 1-3. Martin og Hans Kristian fingu ein uppibornan frídag, sum merkti at Olaf og Carl Eli komu inn á liðið. John og Carl Eli leiktu javnt, meðan Olaf og Eyðun máttu lúta.

Málið er 50% skoru, tvs. 28 stig. Kanska tykist hetta fjart í løtuni, men skjótt kann venda. Helst hitta vit eitt av veikaru liðunum mánadagin."

Føroyar- Moldavia 0,5-3,5
Føroyar - Palestina 2,5-1,5
Føroyar - Mongolia 1,0-3,0

**Einkultúrslitini:**
Martin Poulsen 0,0 av 2
Hans Kristian Simonsen 1,0/2
Olaf Berg 0,0/2
John Rodgaard 1,5/3
Eyðun Nolsoee 1,0/2
Carl Eli N. Samuelsen 0,5/1

## Nicoleta setti met

Tað glapp burtur ímillum hjá okkum seinasta vikuskifti, men við 17 málum í dystinum móti Tjaldri seinasta vikuskifti, setti Nicoleta Radu Hansen nýtt met í málskjóting í føroyskum kvinnuhondbólti í nýggjari tíð.

Nicoleta er nevnliga fyrsta kvinnan seinastu fimm kappingarárini, sum kemur upp á 17 mál í einum dysti. Tríggjar ferðir er komið fyri, at leikarar hava skotið 16 mál, og somuleiðis er tað tríggjar ferðir hent, at ein leikari hevur staðið fyri 15 málum í einum dysti hesi árini. Nicoleta hevur ikki áður verið á hesum listanum fyrr, men við ferðini, sum hon hevur lagt út við hetta kappingarárið, tykist tað bert vera ein spurningur um tíð, áðrenn hon aftur fær sítt navn á listan yvir flest mál í einum dysti.

Fyri seinastu fimm kappingarárini sær listin annars soleiðis út hjá monnum og kvinnum:

| Ár | Leikari | Lið | Dystur |
|---|---|---|---|
| **17 mál** | | | |
| 2004/05 | Nicoleta Radu | Søljan | Tjaldur-Søljan |
| 2002/03 | Áki Mørk | Neistin | KÍF-Neistin |
| 1999/00 | Áki Olsen | Neistin | Neistin-Tjaldur |
| **16 mál** | | | |
| 2003/04 | Simona Petersen | Neistin | Neistin-VÍF |
| 2001/02 | Gabrielle Fekete | VB | StÍF-VB |
| 2001/02 | Simona Petersen | Søljan | Søljan-Stjørnan |
| 2001/02 | Heini Hanusarson | Neistin | Neistin-H71 |
| **15 mál** | | | |
| 2002/03 | Áki Olsen | VÍF | VÍF-Neistin |
| 2001/02 | Bjarni Wardum | H71 | StÍF-H71 |
| 2001/02 | Heini Hanusarson | Neistin | VÍF-Neistin |
| 2001/02 | Asta Petrauskiene | Søljan | Søljan-Kyndil |
| 2001/02 | Ioana Rápa | VÍF | Søljan-VÍF |
| 2000/01 | Gurið Mortensen | VB | Tjaldur-VB |
| 1999/00 | John Petersen | StÍF | VÍF-StÍF |



VB-Stjørnan 22-23 (12-12):

# Gysari í Vági

**Stjørnan vísti stóra styrki, tá tær vendu hóttandi tapi til tepran sigur í einum sonnum gysara í høllini í Vági sunnudagin**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



Mynd: VB-Stjørnan
*Daiva og hinar í VB munnu iðra seg um, at tær innan fimm minuttir í fyrra hálvleiki mistu fimm mála stóra leiðslu*
*Mynd: Áki Bertholdsen*

Tað varð sagt undan dystinum, at talan helst var um veruliga styrkisroynd fyri báðar partar, og skal gangast eftir hesum, so verður talan um sera hart oddastríð í ár.

Meistararnir úr Stjørnuni tryggjaðu sær í vár gullið júst í Høllini í Vági, tá tær settu VB til viks, og tí var einki at ivast í, at hetta fram um aðrar var júst dysturin, sum tær í Vági vildu vinna.

### Mistu leiðsluna

Tað sá eisini leingi út til, at hetta skuldi eydnast VB. Størsta partin av fyrra umfarinum vóru tær omaná, og góðar fimm minuttir fyri leiklok vóru tær á odda við fimm málum.

Men so bragdaði av álvara hjá Stjørnuni. Sum um tær ikki høvdu gjørt annað, varð eitt álop fyri og annað eftir avsluttað upp á rekordtíð, við at antin Katarina ella Alina lupu upp og smekkaðu til, og tá farið varð til hálvleiks, stóð 12-12 uppi á máltalvuni.

Og fyrstu løtuna av seinna umfarinum helt Stjørnan fram í sama lag. Tær vunnu seg upp á 16-13, men so byrjaði VB at svara aftur. Tær fingu alt betri tamarhald á skjúttunum hjá Stjørnuni, og tá alternativini á plássinum eru færri, nú Annika Ljósstein helst er úti restina av árinum, høvdu gestirnir ikki so nógv fólk at flyta runt við, sum tær annars hava havt.

Munurin minkaði spakuliga, og høllin var á gosi, tá tað fýra minuttir fyri leiklok aftur stóð á jøvnum. Stjørnan hevði tó ikki heilt slept takinum. Alina Olaru legði tær enn einaferð á odda, áðrenn Joan Midjord Djordjevic síðani staðfesti, at tað loysti seg hjá felagnum at keypa seg heim til dystin. VB fekk minkað um munin einaferð afturat, men nærri enn tí eina málinum komu tær tó ikki, og fyribils mugu tær tí síggja Stjørnuna nakað framman fyri seg.

### Sterka Stjørna

Og spurningurin er, um ikki Stjørnan longu nú fer at toga seg leyst av hinum liðunum. Í øllum førum tykist liðið hava eina styrki, sum hini ikki megna at standa ímóti.

Tað telur tó skeiva vegin, at skaðin, sum Annika Ljósstein fekk beint undan kappingarbyrjan er somikið álvarsligur, at hon helst ikki verður før fyri at spæla aftur í ár. Hartil fekk Beinta Joensen skaða í hondina í dystinum í Vági, og tað kann viðføra, at Stjørnan fyri eina tíð missir eitt vandamikið kontravápn, tó at Stjørnan á hesum plássinum er sera væl fyri.

Og endaliga, so skal heldur ikki roknast við, at Joan M. Djordjevic verður so nógv at síggja á liðnum í vetur. Hon er farin uttanlands í útbúgvingarørindum, men hesaferð varð hon keypt heim at styrkja um liðið. Tað fer tó ikki at vera galdandi fyri hvønn dyst, og so er spurningurin, hvussu Stjørnan fer at skipa spælið, tá vanligi skiparin ikki er til staðar.

### Breiddin í lagi

Hjá VB mundi tað kennast heldur beiskt, at tær soleiðis skuldu missa eina annars trygga leiðslu, men tað er einki at ivast í, at eisini tær verða drúgvar í ár.

Útlendingarnir á liðnum eru tær somu, og tó at Gurið Mortensen uttan iva er svárur missur hjá liðnum, so telir tað rætta vegin, at Sólrun Krosslá, Christina Holm og Arnleyg Hjelm nú aftur hava tikið hondbóltin fram. Tað ger í øllum førum, at hópurin í ár er eitt fitt petti breiðari, enn hann var tað í fjør, og tað kann gera munin, tá tættir og orkukrevjandi dystir eru á skránni.

**FAKTA UM DYSTIN**

**VB-Stjørnan 22-23 (12-12)**
**Málskjúttar**
**VB:** Aukse Vysniaskaite 8, Daiva Toumaite 5(2), Rannvá Augustinussen 5, Margreth Augustinussen 2, Christina Holm 1, Arnleyg Hjelm 1
**Stjørnan:** Alina Olaru 6(3), Katarina Stepanov 6, Joan M. Djordjevic 4, Anna Kristina Samson 3, Beinta Joensen 3, Una Olsen 1
**Brotskøst:** VB 3, Stjørnan 4
**Útvísingar:** VB 2, Stjørnan 3
**Dómarar:** Kári Hansen & Dánjal Hansen

# Egil aftur á Mølina

**Egil á Bø flytir nú úr B36 og aftur til EB/-Streym, har hann ætlar at vera, inntil hann fer at gevast at spæla á hægsta støði**

EB/STREYMUR FYRIREIKING
*Jóannes Hansen*



*Egil á Bø er nú aftur í EB/Streymi, og sjálvur sigur hann, at hetta helst verður endastøðin í fótbólti fyri hansara viðkomandi*

EB/Streymur rakk í júst farna kappingarárinum fimta plássinum. Tað er besta endastøða, sum EB/-Streymur nakrantíð hevur rokkið í bestu deildini.

Felagið er farið undir fyrireikingarnar til nýggja kappingarárið. Piotr Krakowski verður venjari, men talan verður ikki um stórvegis útskiftingar í spælarahópinum. Tað hevur ikki verið at frætt um nakran, sum ikki fer at halda fram, og í EB/Streymi verður sagt, at teir hava ikki ætlanir um at leita eftir nógvum nýggjum spælarum. Teir eru væl nøgdir við fólkið, sum teir hava havt.

Ein nýggjur spælari kemur til EB/Streym. At siga, at talan er um nýggjan spælara, er kanska at taka munnin í so fullan. Talan er heldur um gamlan kenning, sum leitar aftur til barndómsfelagið.

Egil á Bø spældi í fjør við EB/Streymi. Í ár hevur hann aftur verið í B36, har hann var í fleiri ár, áðrenn hann í fjør fór aftur til EB/-Streym, og nú er hann á veg aftur á Mølina.

– Jú, tað er rætt, at eg havi gjørt avtalu við EB/-Streym um, at eg skal spæla við teimum næsta ár. Eg eri 30 ára gamalur, og árini fara at fække, sum eg havi eftir í fremstu røð. Eg taki eitt ár í senn. Sum tað sær út í løtuni, so ætli eg mær ikki aftur at skifta felag. Eg verði í EB/Streymi, inntil eg fari at gevast, sigur Egil á Bø.

Umframt í EB/Streymi og B36 hevur Egil á Bø eisini spæl við ÍF og NSÍ.